# Bygnaðarbroytingar í Heimamissiónini

**Starvsfólkini í Heimamissiónini (HM) fara framyvir at vera býtt í tvær deildir. Vagn Foldbo er aðalskrivari hjá HM, og hann er yvirskipaður leiðari undir høvuðsstýrinum. Hann fer at hava tvær deildarleiðarar undir sær**

HM er ein rørsla, sum er tengd at Fólkakirkjuni. Aðalmálið hjá rørsluni er at hjálpa og geva menniskjum eina bíbilska mynd av, hvør Jesus er, og hvat hann vil við lívi teirra, stendur á www.mission.fo, sum er heimasíðan hjá HM. Rørslan hevur virksemi um mestsum alt landið. Høvuðssætið er leguhúsið í Nesvík, sum verður dúgliga brúkt - serliga um summarið.

- Vit hava heilt vist tørv á broytingum. Tað er nógv broytt síðani 1990, tá ið HM varð yvirtikin. Tá vóru sjey fólk í starvi, og nú eru vit 20. Rørslan hevur altíð verið bygd á sjálvboðið arbeiði, og soleiðis er tað enn. Men síðani leguhúsið kom, og vit hava víðkað



*Vagn Foldbo, aðalskrivari í Heimamissiónini, fegnast um bygnaðarbroytingarnar*
*Mynd: Frants Jensen - Trúboðin*

um okkara virksemi við fleiri tiltøkum, er tørvurin á løntum starvsfólki størri enn áður, sigur Vagn.

Høvuðsstýrið er hægsti myndugleiki í HM, og aðalskrivarin er undir stýrinum. Sostatt hava mestsum allar uppgávur gingið ígjøgnum aðalskrivarin, og sostatt verður arbeiðið ikki nóg smidligt.

- Arbeiðsbyrðan hjá mær hevur verið sera stór, og tað gerst ein ónd ringrás. Nú fái eg so tveir deildarleiðarar undir mær. Við nýggju skipanini fái eg betri stundir til starvsfólkarøkt, sum jú er mítt øki. Hetta hevur tíverri verið forsømt, tí at eg havi havt so nógvar aðrar uppgávur, staðfestir Vagn.

Onnur deildin verður kallað Samskiftisdeild. Har undir eru skrivstovufólkini, Trúboðin, forlagið og annað. Jørmund Foldbo, sum er fíggjarleiðari, verður leiðari á Samskiftisdeildini. Hann fær so ein skrivstovunæming afturat sær at røkja fíggjarviðurskiftini. HM søkir nú eftir skrivstovunæmingi.

Hin deildin er boðanardeildin. Har eru trúboðararnir úti og heima, skrivararnir og ráðgevararnir. HM søkir eftir fólki til at leiðarastarvið í boðanardeildini, og tað verður sett í nærmastu framtíð. Leiðarin í boðanardeildini skal hava ábyrgd av útimissión, samstundis sum viðkomandi eisini stendur fyri missiónini her heima.

- Broytingarnar fara at gera tað lættari at samskipa missiónsarbeiðið hjá okkum. Nýggju tíðirnar krevja, at vit hava eina góða skipan og fyrisiting. Eisini kunnu vit gera eitt meira málrættað arbeiði við boðan.

- Vit vænta, at tær ymsu greinarnar fáa lættari við at samstarva og kunnu soleiðis fáa nyttu úr kunnleikanum hjá hvørjum øðrum. Við bygnaðarbroytingunum kunnu vit betri røkka okkara visjón um at "náa menniskjum har tey eru", sigur Vagn.

# Nebo í gerð

Arbeiðið við samkomuhølunum hjá Nebo á Toftum fer nú í gongd aftur eftir ein summarsteðg. Leivur á Torkilsheyggi er við í elstaráðnum í Nebo, og hann er væl nøgdur við gondina higartil.

- Mestsum alt arbeiðið verður gjørt sjálvboðið av fólkunum í samkomuni. Onkuntíð kemur onkur uttanifrá at taka hond um, og tað eru vit takksom fyri. Vit eru býtt upp í tvey toymi og arbeiða aðru hvørja viku uppá skift. Um alt gongur væl, verður nýggi bygningurin liðugur um eitt ár, sigur Leivur.

Arbeiðið við nýggja bygninginum byrjaði fyri fýra árum síðani. Tað eru um 60-70 fólk, sum ganga í Nebo. Núverandi høli eru alt ov lítil, og tí læna tey onkuntíð gamla skúlan til møtir.



## **Romain** aftur til Føroya

**Romain Zannou úr Benin kemur aftur til Føroya. Hann var her uppi til ársmøtini hjá Heimamissiónini í fjør, og nú kemur hann aftur. Tað er Jeffri Johannesen úr Lamba, sum hevur skipað fyri ferðini hjá honum**

**Dent á tey ungu:** Romain skal hava eina møtirøð á Glyvrum vikuskiftið 17.-19. november.

- Vit fara at leggja dent á tey ungu. Øll eru sjálvandi vælkomin, men tey skulu vita, at vit leggja okkum eftir at náa tey ungu við hesum møtunum, sigur Jeffri.

Umframt møtirøðina verður møguliga skipað fyri almennari undirvísing um samskifti í hjúnarbandinum. Hetta er eitt spennandi evni, har ið Romain eisini kemur inn á hjúnarskilnað og uppafturgiftu.

**Leiðari hjá pastorum**

Í heimlandinum Benin er Romain leiðari og undirvísari hjá 250 pastorum. Kirkjan sum heild hevur umleið 20.000 limir. Men hvør kirkja sær er ikki størri enn 300 fólk.

- Tey vilja ikki hava ov stórar kirkjur. Í staðin býta tey seg upp, tá ið tey gerast mong. Hetta er at líkna við kyknubólkar, sum summar samkomur í Føroyum kenna til.

Um Romain fær innferðarloyvi, verður hann í Føroyum vikuskiftið 17. - 19. november.

átrúnaður



orðið

## Rætvísgjørdur av **trúgv**

Jesu krossdeyði og uppreisn frá deyðum er miðdepilin í kristnu trúnni og grundarlagið undir rættvísgerðingini av trúgv eina.

Í Gamla Testamenti er aðalvitnið, tá talan er um rættvísgerðing av trúgv, Abraham. Abraham trúði Gudi, og hann roknaði honum tað til rættlætis. Og apostulin Paulus ger greitt í Galatarbrævinum: "Vit vita at maður ikki verður rættvísgjørdur av lógargerningum, men eina við trúgv á Jesus Krist" (2,16). Og hann heldur fram: "Rættvísgjørd av trúgv hava vit tí frið við Gud við Harra okkara Jesusi Kristi" (Róm. 5, 1). Trúarrættvísin hevur sína haldgóðu grund í Jesu krossdeyða og uppreisn, meðan lógarrættvísin hevur sína ivasomu grund í menniskjans egnu dygdum og góðgerðum.

Rættvísgerðingin av trúgv er Guds gáva í syni sínum Jesusi Kristi til okkum falnu og endurreistu menniskju. Hvussu kunnu vit lýsa hetta á fullgóðan hátt? Ein vakran summardag seta vit okkum í bilin og koyra ein túr. Leiðin gongur gjøgnum ein vátan og myrkan tunnil. Tá vit nærkast tunnilsmunnanum streymar eitt undursamt ljós ímóti okkum meðan vit enn eru inni í tunnlinum. Vit koma út í ljósið og frælsið og verða blendað av Guds náðar sól.

Hava teir góðu gerningarnir tá ongan týdning? Tær menniskjaligu dygdirnar og teir góðu gerningarnir hava alstóran týdning í mannalívinum og eru Guds góði vilji. Vit liva av góðgerðunum hjá hvørjum øðrum! Men góðgerðirnar føra okkum ikki inn í Guds ríki, tað ger bara trúgvin á Jesus Krist, ið rættvísgerð andlit til andlits við hin livandi Gud. Ella sagt við fyndarorðunum hjá Mika profeti: "Tær hevur Harrin kunngjørt, hvat ið gott er. Hvat krevur hann av tær annað enn at gera tað; sum rætt er, at stunda á kærleika og í lítillæti fylgja tínum Gudi" (6,4). Amen.

***Meinhard Bjartalíð, prestur***